# Grundarsteinur: Samfelagsbygnaður

## Aðalmál

**Føroyar – ein opin og burðardyggur marknaðarbúskapur við grundfesti í vælferðarsamfelagnum, har avgerðir og ábyrgd eru nær borgaranum, og har uppgávurnar verða loystar við størst møguligari virðisskapan.**

Málið er at skapa best møguligar karmar fyri búskaparmenning og búskaparvøkstri, so at vit í Føroyum í 2015 vera millum fremstu tjóðir búskaparliga. Strategibólkurin heldur, at um skipað verður fyri burðardyggum, strategiskum tiltøkum eru góðir møguleikar fyri at skapa búskaparlig meirvirði fram til 2015 og longri – bæði í almenna og í privata partinum av búskapinum.

Í privata partinum av búskapinum er ein røð av forðingum fyri, at hesin kann virka til fulnar og geva sum mest av sær samfelagsbúskaparliga. Størri tilvitan um vinnuligar studningsskipanir skal føra til, at slíkar skipanir verða tiknar av, um ikki úrtøkumetingar (*cost-benefit-metingar*) greitt kunnu vísa, at tær geva samfelagslig meirvirði. Mett verður ikki, at nakrar av teimum stóru stuðulsskipanunum, sum virka í dag, lúka slík krøv, og tí eru gjørd tilmæli um, hvørjar av hesum skipanum eiga at verða avtiknar. Mælt verður eisini til at betra um vinnukarmarnar við at einskilja almennar fyritøkur, og við at tillaga vinnulívslóggávuna.

Skatta-, avgjalds- og studningsskipanir eru týðandi amboð, tá samfelagsvirðini verða deild millum borgararnar. Hesar skipanir hava eisini stóran týdning fyri t.d. hugin hjá fólki at arbeiða og vinnubygnaðin í samfelagnum. Mælt verður til at leggja skatta- og avgjaldsskipanir soleiðis til rættis, at hesar skapa eins fortreytir fyri allar borgarar og allar vinnur. Hetta merkir at serskipanir ikki skulu galda fyri ávísar starvsfólkabólkar ella ávísar vinnur.

Tað hevur týdning, at Føroyar eru kappingarførar við onnur lond, tá um skattatrýst ræður. Tí verður mælt til at lækka inntøkuskattin. Hesin lætti verður fíggjaður við sparingunum hjá tí almenna, tá serligu stuðulsskipanirnar til ávísar vinnur og ávísar bólkar verða tiknar av, umframt við at breiðka skattagrundarlagið.

Til ber eisini at fáa tað almenna at virka munandi betur – m.a. við broyttum karmum, nýggjum bygnaðum og nýggjum stýringsamboðum. Verandi játtanarskipan eggjar ikki til best møguligu nýtslu av skattakrónum borgarans, og her eiga broytingar at fremjast, og m.a. eigur mál- og avriksstyring at verða sett í verk í almenna geiranum. Á kommunala økinum vilja færri og størri eindir saman við felags bókingar- og roknskaparfyriskipan skapa stórrakstrarfyrimunir og betri møguleikar fyri samskipan og at samanbera úrslit hjá kommunum. Fleiri hættir eru sostatt at betra um almenna partin av búskapinum, so at tað almenna kann veita fleiri og betri tænastur fyri sama kostnað, ella at veita sama tænastustig fyri minni kostnað.

# Inngangur

Strategibólkurin hevur í tilmæli sínum lagt størstan dent á tiltøk, ið kunnu skapa búskaparlig meirvirði/búskaparvøkstur í samfelagið – antin í sjálvum sær, ella við at beina burtur skipanir, ið fáa fólk og fyritøkur at taka skatta- og studningsatlit heldur enn marknaðaratlit. Ásannað verður tó, at í einum vælferðarsamfelagi eru – og skulu vera – skipanir og lóggáva, ið hava sum endamál at virka fyri øðrum málum enn reinum búskaparligum framburði, og ofta samsvara hesi mál ikki við ynskið um størst møguligan búskaparvøkstur. Til dømis kann talan vera um sosial ella geografisk atlit. Lesarin eigur tí at gera sær greitt, at strategibólkurin *ikki* leggur fram ein politikk, men eitt uppskot um nøkur tiltøk, ið út frá einum reint fakligum, búskaparligum sjónarmiði fara at geva okkum størri møguleikar fyri búskaparligum framburði. Luturin at viga ímillum búskaparvøkstur og onnur atlit verður politikarans – eins og hann eigur avgerðina um, hvørji tiltøk skulu setast í verk.

Í hesum parti av strategiini er evnið samfelagsbygnaður, og frá politiskari síðu er arbeiðið avmarkað til hesi partmál:

1. skatta-, avgjalds- og stuðulsskipanir
2. kapitalmarknaður
3. almennur bygnaður
4. býtið millum alment og privat
5. býtið millum land og kommunur

Bólkurin hevur sett mál innan furi hesi fimm partmál. Onnur mál sum t.d. vælferð, útbúgving og gransking, ið eisini eru týðandi evni, tá um samfelagsbygnað ræður, verða viðgjørd av øðrum strategibólkum í visiónsarbeiðnum, og verður tí ikki komið inn á tey her.

Ein tann týdningarmesta fortreytin fyri, at Føroyar verða millum bestu lond at virka og liva í, er, at vit megna at skapa nóg stóran búskaparvøkstur. Innan fyri tey fimm omanfyri nevndu evni koma vit við uppskotum um, hvussu vit kunnu røkka hesum máli. Vit viðgera málið um størst møguligan búskaparvøkstur út frá eini heildarmynd fyri alt samfelagið, og sum dømi kann nevnast, at tá ið "almennur bygnaður" verður viðgjørdur, viðgera vit hann einans útfrá, hvussu hann skapar størstu virðisøking fyri samfelagið sum heild, og ikki hvussu hann t.d. kann menna útjaðaraøkini. Hetta er soleiðis at skilja, at skapar eitt ítøkiligt tiltak virðisvøkstur í ávísum øki, men virðisminking fyri samfelagið sum heild, so mæla vit frá at gera hetta tiltak.

Tað kann staðfestast, at vit í Føroyum ikki eru eins produktiv og grannalond okkara, um vit máta BTÚ fyri hvønn íbúgva. Men hví eru vit ikki eins væl fyri og grannalondini ? Eru tað náttúrugivnar orsøkir, ið vit einki fáa gjørt við, ella eru viðurskifti, ið vit kunnu broyta fyri at fáa størri vøkstur og harvið betri lívskor í Føroyum? Tær náttúrugivnu treytirnar avgera eyðvitað grundtreytirnar í búskaparmenningini, men eisini samfelagslig viðurskifti hava stóran týdning, og eingin grund er at halda, at búskaparligu mekanismurnar virka øðrvísi í Føroyum enn aðrastaðni. Heldur er tað so, at hóast sereyðkenni, sum øll samfeløg hava meiri og minni av, so hátta aktørarnir á føroyska marknaðinum seg eins og teir á øðrum marknaðum.

Búskaparligur vøkstur kann verða ávirkaður av viðurskiftum, ið vit ikki hava tamarhald á, (t.d. broytingum í olju- og fiskaprísum, útlendskum handilsforðingum, oljufundum í undirgrundini o.s.fr.). Vit gera tí vart við, at hóast øll tilmæli okkara verða framd, so er

kortini ikki vist, at vit gerast millum fremstu tjóðir búskaparliga. Til tess eru ókendu viðurskiftini ov mong.

Umframt tær náttúrugivnu fortreytirnar, ið vit ikki fáa gjørt nakað við, eru tó eisini bygnaðarlig viðurskifti, ið vit fáa gjørt nakað við. Í hesum kapitli verður víst á nøkur slík viðurskifti, sum eftir okkara tykki darva búskaparvøkstri og seinka framburði, og gjørd eru tilmæli um, hvussu hesi eiga at verða broytt. Tey tiltøk, ið eru nevnd í hesum parti av Visjón 2015, eru tí týdningarmikil íkøst til at skapa størst møguligan búskaparvøkstur.

## Partmál

### Skatta-, avgjalds- og stuðulsskipanir

- **Allar vinnuligar studningsskipanir skulu sum meginregla takast av.**
- **Eyðkent fyri skatta- og avgjaldsskipanir skal vera, at tær:**
    - **Skapa eins fortreytir fyri allar borgarar**
    - **Skapa eins fortreytir fyri allar vinnur**
    - **Eru greiðar og ikki avlagandi**
    - **Skattatrýstið skal verða kappingarført við tað í grannalondunum**

Í upprunaligu arbeiðsætlanini, ið strategibólkurin fekk handað, vóru skatta- og avgjaldsskipanir og stuðulsskipanir tvey serstøk punkt; men av tí at hesar skipanir viðvíkja hvør aðrari almikið, varð avgjørt at viðgera hesar undir einum. Í hesum parti umrøða vit serliga, hvussu stóru skatta- og stuðulsskipanir okkara ávirka vinnubygnaðin, og vit avmarka okkum tí til skatta- og stuðulsskipanir á vinnuøkinum. Vinnulóggávan verður eisini umrødd í teimum førum, har hon virkar sum stuðul. Hinvegin verður ikki viðgjørt hvussu samfelagsvirðini kunnu býtast millum samfelagsbólkar við skatta- og stuðulsskipanum, av tí at hetta evnið verður viðgjørt í visiónini um vælferð.

Høvuðsboðskapurin í hesum parti er at:

- skattafyrimunir og stuðul til ávísar bólkar og vinnur skulu takast av tí hesir føra til minni produktiva nýtslu av samfelagsins tilfeingi og hava harvið negativ avlagandi árin á búskapin. Stuðulin førir til, at framleiðslufaktorarnir verða stuðlaðir at verða verandi í framleiðsluveikum vinnum, og hetta minkar um samlaðu virðisskapanina í samfelagnum.
- skattagrundarlagið verður breiðkað.
- inntøkuskatturin skal lækka, og henda lækking skal fíggjast við tí peningi , tað almenna sparir við at taka av skattafyrimunir og beinleiðis stuðul til ávísar bólkar og vinnur umframt at breiðka skattagrundarlagið. Har tað verður avgjørt at geva stuðul, t.d. til

sosial endamál, skal hetta gerast sjónligt við útgjaldi og skal ikki vera latið sum frádráttur.

Um vinnuligan stuðul kann sigast, at hann:

- avlagar eftirspurningin eftir framleiðslufaktorum
- minkar um kappingina og er kappingaravlagandi
- eggjar fyritøkum at nýta orku til at fáa stuðul heldur enn at framleiða
- seinkar og forðar tillagingum í vinnunum

Stuðul til ávísar vinnur skapar meira virksemi í hesum vinnum, men hetta er ikki tað sama sum at samfelagið sum heild verður ríkari. Um økta virksemið er grundað á stuðul og ikki á framleidnisfyrimunir, høvdu arbeiðsmegin og kapitalurin, sum verða bundin í stuðlaðu vinnuni, verið betur nýtt í øðrum vinnum við betri framleidni. Ella sagt við øðrum orðum: vinningurin av størri framleiðslu í stuðlaðum vinnum verður goldin við minni framleiðslu í øðrum, meiri produktivum vinnum, og samfelagið sum heild verður tí ikki ríkari av vinnuligum stuðli. Um stuðlaða vinnan hevur betri framleidni enn aðrar vinnur, er óneyðugt at stuðla henni, tí hon er før fyri at bjóða nóg góða løn og avkast til at klára kappingina um arbeiðsmegi og kapital. Í hvørgum føri fær samfelagið meirvirði burtur úr vinnuligum studningspolitikki, men verður tvørturímóti fátækari.

Búskaparfrøðingar eru yvirhøvur samdir um, at vinnuligur stuðul hevur negativ árin á samfelagsbúskapin. Men marknaðarbúskapurin kann tó í serligum førum hava nakrar veikleikar, har stuðul kann styðja undir at fáa betri tilfeingisnýtslu. Áðrenn vinnustuðul verður latin, eigur tó altíð at vera mett um, hvørt onnur átøk eru betri, og um vinningurin við at stuðla er størri enn kostnaðurin av at seta hann í verk og umsita hann. Mett verður, at eingin av teimum stóru stuðulsskipanunum, sum eru virknar í Føroyum í dag, hava eyðkenni, ið út frá búskaparligum sjónarmiðum kunnu rættvísgera tær.

Um stuðul skal veitast, er neyðugt við ítøkiligum útrokningum av samfelagsligum vinningi og útreiðslum fyri hvørja einstaka stuðulsskipan, tí skipanir, sum tykjast at vera skilagóðar, kunnu hava so stóran óbeinleiðis kostnað, at samfelagsvinningurin verður negativur. Skulu ávísar vinnur, íverksetarar, granskarar ella annað stuðlast, er sera umráðandi at:

- stuðulin er sjónligur á fíggjarlógini, so at eftirlit hevst við honum, og støða skal takast til hansara hvørt ár.
- greitt er, hvussu stuðulin ætlandi skal gagna samfelagnum.
- samfelagsbúskaparligar greiningar verða gjørdar av stuðlinum. Hesar greiningar mugu gerast av óheftum serfrøðingum, áðrenn avgerð verður tikin um at lata stuðul, og meðan stuðulin verður latin.

Harumframt kunnu greiningar av áður latnum stuðli hjálpa til at taka røttu avgerðina. Krøv eiga at verða sett teimum, ið fáa stuðul, at tey lata neyðuga frágreiðing um, hvussu stuðulin hevur virkað. Um t.d. íverksetarar skulu hava stuðul, eiga ávísir fyrimunir at síggjast av hesum, t.d. sum vøkstur í produktivitetinum og harvið í lønum og avkasti. Tað eigur at kunna ávísast, at almenni stuðulin hevur tað úrslit, at tað er betri fyri samfelagið, at íverksetarar eru íverksetarar heldur enn at starvast í øðrum vinnum.

Við úrtøkumetingum og upplýsingum frá teimum, ið fáa stuðul, hava politikarar eitt ávíst grundarlag at meta um samfelagsbúskaparligu fyrimunirnar í at stuðla ávísum vinnum. Hetta er ikki lætt at seta upp í greiðum tølum, men til ber at gera regluligar kanningar av avkastinum av kapitali og arbeiðsmegi í stuðlaðu vinnunum og at samanbera hetta við avkastið í øðrum vinnum.

Stuðulin til føroysku fiskivinnuna er gott dømi um skipan, ið hevur virkað illa, tí hóast hon virkaði í fleiri ár, fór vinnan á húsagang. Síðan kreppuna er størsti parturin av stuðulsskipanunum tikin av, og síðan tá hevur fiskivinnan borið seg nógv betur. Eyðvitað hevur stuðulin ikki elvt til hvørki kreppu ella framgongd einsamallur, men flestøll mugu vera á einum máli um, at tann yvirkapasitetur, ið stóðst av ovurhonds stóra stuðlinum, hevði at kalla bert ringar avleiðingar. Eitt eyðkenni fyri flestu stuðulsskipanir er, at tær eggja fleiri aktørum at koma inn á marknaðin, enn rúm er fyri, og einasti háttur at halda marknaðinum uppi, er at halda fram at stuðla. Verður stuðulin tikin av, mugu tær fyritøkur gevast, ið einans megnaðu at vera í vinnuni orsakað av stuðlinum. Við hesum verða arbeiðsmegi og kapitalur frígivin og kunnu koma framleiðslusterkari fyritøkum til góðar. Sum endurskipanin av føroysku fiskivinnuni eftir kreppuna hevur sýnt, so eru ofta stórir fyrimunir við slíkum avtøkum, hóast tillagingartíðin kann vera bæði svár og torfør.

Av tí at størstu vinnubygnaðarligu skeivleikarnir hava verið og framvegis eru í fiskivinnuni, er sjálvsagt at viðgera hesar mest. Men eisini í øðrum vinnum, sum t.d. byggivinnuni og landbúnaðinum eru stuðulsskipanir, ið gera, at stuðlaðu vinnunum nýtist ikki at vera líka produktivar sum aðrar vinnur fyri at fáa arbeiðsmegi og kapital, og dentur verður tí lagdur á, at skattliga javnsetningin skal galda allar vinnur.

Skattainntøkurnar hjá landi og kommunum eiga at verða nýttar til at fíggja tær vælferðartænastur, ið samfelagið vil bjóða borgarum sínum, og skulu ikki nýtast til at føra vinnupolitikk og stuðulspolitikk við t.d. at geva ávísum vinnum ella bólkum framíhjárættindi við skattalættum og øðrum.

Umráðandi er eisini, at skattatrýstið er kappingarført við tað í grannalondunum. Føroyar hava longu ilt við at standa seg í altjóða kappingini um arbeiðsmegina, m.a. tí at nettolønarlagið er lægri her enn í grannalondunum. Eitt høgt skattatrýst fer bara at gera tað enn torførari at fáa nýggja arbeiðsmegi til landið og at varðveita verandi arbeiðsmegi.

## Soleiðis røkka vit málinum

### 1. Allar vinnuligar studningsskipanir skulu sum meginregla takast av

At taka burtur vinnuligar studningsskipanir verður mett at vera eitt týdningarmikið átak til at fáa vinnuni eitt sunnari grundarlag at standa á og harvið grundarlag fyri størri búskaparvøkstri. Hetta, tí at skatta- og studningshugsan ger, at tað fær tann stuðlaða at velja vinnu út frá øðrum atlitum enn teimum reint framleidnisgrundaðu. Mælt verður til at taka av hesar studningsskipanir:

- MVG-frítøkur, ið ávirka vinnubýtið í landinum (t.d. húsabygging, húsaumvæling o.s.v.)
- Sjómannafrádráttin
- Minstulønin og dagstudning til sjómenn
- Fiskavirkisskipanin

- Landbúnaðarstuðul
- Rentustuðul til bústaðarlán
- Stuðul til skipasmíð.
- Óbeinleiðis stuðul (forðingar og avmarkingar) í øðrum lóggávum sum t.d. í lógini um vinnuligan fiskiskap

Ásannandi, at hetta verður alstór broyting hjá mongum, er best at gera hetta í eini tillagingartíð. Hvussu long henda tillagingartíð skal vera, kunnu ymsar meiningar vera um, men ikki er ráðiligt at hava hana ov langa, og umráðandi er at seta sjøtul á arbeiðið sum skjótast.

Mælt verður til at munagóð stig longu í 2007 verða tikin til at taka av ella lækka teir studningar, sum eru nevndir omanfyri, og at leggja eina ætlan fyri, hvussu hvør einkultur stuðul verður tikin av.

MVG-frítøka fyri húsabygging og húsaumvæling eigur at vera tikin av, tí umframt at skipanin ikki skapar samfelagslig meirvirði, so er MVG-stuðulin sera lítið gjøgnumskygdur og er tungur at umsita.

Sjónarmiðið at "fiskivinnan hevur so stóran týdning í føroyska samfelagnum, og tí eiga vit at hjúkla um hana og stuðla, har tað er neyðugt" er ikki ókent. Samfelagsbúskaparliga er tó eingin grundgeving fyri hesum. Fiskivinnan er nógv størsta vinnan í føroyska búskapinum, og tí hevur tað alstóran týdning, at karmarnir hon virkar undir tryggja, at hon gevur størst møguliga virðisskapan fyri samfelagið og ikki einans fyri aktørarnar í vinnuni. Útflutningsvirði hava ikki størri samfelagsvirði enn onnur framleiðsluvirði, og tí skulu útflutningsvinnur ikki hava eina skatta- ella studningsgrundaða serstøðu.

Nógvar stuðulsskipanir í fiskivinnuni eru tiknar av síðan kreppuna. Men enn eru tó stuðulsskipanir í hesi vinnu, og tær størstu eru sjómannafrádrátturin, minstaløn og dagstudningur til sjómenn og fiskavirkisskipanin til fólk, ið arbeiða í fiskivinnuni á landi. Hetta eru alt studningar – beinleiðis og óbeinleiðis, sum avlaga og forða tillaging til marknaðin. Hesar skipanir tilskunda fólki at vera í fiskivinnuni, og tað er ein mótsøgn til tað, at politikarar minka um fiskidagatalið, tí veiðitrýstið er ov høgt. Hesar stuðulsskipanir hava eisini tað eyðkenni, at tær beinleiðis ella óbeinleiðis eru partar av lønini hjá teimum, ið eru vinnuni. Eins og galdandi er á øllum øðrum marknaðum, eiga lønarviðurskifti í fiskivinnuni at vera avgjørd við samráðingum millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar. Mælt verður tí til at taka av hesar skipanir.

## 2. Fram til 2015 verður inntøkuskatturin lækkaður munandi. Hetta verður fíggjað við at taka av studningsskipanir og við at breiðka skattagrundarlagið

Ein stórur partur av visjónini á skatta- og studningsøkinum er at taka av skattligan mun á vinnum. Greitt er, at tá skattalættar og annar stuðul verður latin til ávísar bólkar og vinnur, eru tað tær vinnur og bólkar, ið ikki fáa hesar skattalættar og stuðlar, sum gjalda fyri tað, við hægri skattabyrðum. Um vit taka av studningsskipanir uttan at javna afturímóti, so veksur samlaða skattabyrðan, av tí at meiri skattur verður lagdur á stuðlaðu vinnurnar. Ætlanin við at taka av studningsskipanirnar er tó ikki, at skattatrýstið sum heild skal verða størri, og fyri at halda avtøkurnar skattliga neutralar verður tí mælt til, at inntøkuskatturin verður lækkaður við eini upphædd, ið svarar til vinningin av at taka av studningsskipanirnar.

Tað skal undirstrikast, at framferðarhátturin at lække inntøkuskattin, samstundis sum studningsskipanir verða avtiknar, eisini ger, at tær vinnur, sum missa sína skattligu serstøðu, vilja vera minni ávirkaðar, enn um umleggingin ikki vildi ført til lægri generellan skatt. T.d. vil avtøka av sjómannafrádráttinum í sjálvum sær gera, at tøka inntøkan hjá sjómonnum fellur, men lækkingin av vanliga inntøkuskattinum vil gera missin væl minni, enn hann annars vildi verið. Tað sama er galdandi fyri aðrar vinnur, sum missa serrættindi. Tá ið samanum kemur kann tó roknast við, at stuðlaðu vinnurnar fara at missa ávísa nøgd av arbeiðsmegi og kapitali til vinnur, ið ikki hava verið stuðlaðar. Hetta endurspeglar tó, at fólk velja sær vinnu út frá framleidnismuni og ikki skattligum muni, og fyri samfelagið verður hetta ein sera positiv gongd.

Aftur at avtøkuni av studningsskipanum, sum eru nevndar undir punkti 1, skal eitt breiðari skattagrundarlag vera við til at fíggja tann lægra inntøkuskattin.

## 3. Breiðari skattagrundarlag

Skatta- og avgjaldsinntøkurnar hjá tí almenna koma í høvuðsheitum frá vanligum inntøkuskatti, MVG- og punktgjøldum og frá partafelagsskatti. Tó at hesar inntøkur óivað eisini fara at vera megininntøkur hjá tí almenna í framtíðini, eru fleiri møguleikar at breiðka skattagrundarlagið. Stórar skattainntøkur hjá tí almenna er tó ikki eitt aðalmál í sjálvum sær, og verður tí mælt til, at breiðkaða skattagrundarlagið ikki verður nýtt til at økja um samlaðu skattabyrðuna, men at tað verður partur av eini skattaumlegging, har t.d. inntøkuskatturin verður lækkaður í samsvari við tær øktu inntøkurnar, sum eitt breiðari skattagrundarlag gevur.

Skattagrundarlagið verður breiðkað við at leggja skatt á aktiv og virksemi, sum í dag hava skattafyrimun fram um onnur líknandi aktiv ella virksemi, og við at leggja skatt ella gjald á vinnuøki, har atgongdin til vinnuna er avmarkað orsakað av lóggávuverkinum. Mælt verður í hesum sambandi tí til at leggja skatt ella gjald á hesi økir:

***Tilfeingisrenta***: Fyri at avmarka veiðitrýstið hevur tað almenna í fleiri ár avmarkað talið á veiðiloyvum og fiskidøgum. Henda avmarking verður útint við at tilluta einum avmarkaðum talið av borgarum hesi rættindi. Tað er okkara hugburður, at samfelagið, umframt vanliga partafelagsskattin, eigur at fáa eitt gjald ella ein skatt afturfyri, um tey latnu serrættindini geva óvanliga stóran vinning. Hetta er eisini galdandi í øðrum vinnum, t.d. alivinnuni, har tað krevst serlig loyvi at virka frá tí almenna.

Nógv uppskot hava verið sett fram, bæði politiskt og av búskaparserfrøðingum, hvussu eitt sovorðið gjald ella skattur skuldi verið sett í verk, og vit meta tað vera týdningarmikið, at komið verður fram til eina skipan, sum hevur eitt gott samfelagsbúskaparligt støði at standa á, og sum samstundis er grundað á eina breiða, politiska og fólksliga undirtøku.

***Immateriellar ognir***: Immateriellar ognir hava eina skattliga serstøðu í mun til onnur sløg av ognum, tí at vinningur av sølu av flestu sløgum av immateriellum ognum ikki er skattskyldugur. Sum er, verður sostatt í løtuni bara vinningur av goodwill og fiskiloyvum skattaður, meðan onnur sløg av immateriellum ognum og søla av t.d. leigusáttmálum, mjólkakvotum, aliloyvum, patentrættindum og øðrum er skattafrí. Samfelagsbúskaparliga og skattatekniskt er einki, sum talar fyri, at hetta skal vera so, og mælt verður tí til at broyta skattalógina, so at vinningur av sølu av øllum immateriellum ognum verður javnsett við sølu av øðrum ognum. Nevnast kann, at síðan bólkurin hevði hesa javnseting í uppskoti á visiónsdegnum í september 2006, hevur Landsstýrið lagt uppskot fram um hetta sama. Tað tykist tí, sum at hesin trupulleiki verður greiddur.

***Vinningur av sølu av fastari ogn*** (tó ikki av egnum bústaði): Sambært galdandi skattalóggávu verður vinningur av sølu av ognum ikki skattaður, um ikki aðrar ásetingar í skattalógini siga, at vinningurin skal skattast. Hesar ásetingar galda:

1. tá ið talan er um sølu av bygningum, ið kunnu skattliga avskrivast sambært avskrivingaravtaluni
2. tá ið sølan fer fram sum ein partur av vinnuligum virksemi hjá seljaranum
3. tá ið talan er um spekulasjón

Í øðrum londum eru strangari reglur um skatting av fastari ogn enn í Føroyum. Mælt verður til broyta lóggávuna, soleiðis at allur vinningur av sølu av føstum ognum í framtíðini verður skattskyldugur. Tó skal ásetingin um skattafrítøku av sølu av egnum bústaði, ið seljarin hevur átt í meiri enn tvey ár verða óbroytt, tí m.a. umsitingarliga byrðan av at meta um søluvinningin er ov tung í mun til samfelagsliga fyrimunin av skattingini.

Henda skattabroytingin merkir sostatt, at eisini søla av jørð, grundstykkum og húsum, ið ikki eru egin bústaður hjá eigaranum, í framtíðini fara at verða skattskyldug.

Umframt nevndu øki eru nøkur øki, ið møguliga kunnu vera við til at breiðka um skattagrundarlagið, men sum krevja munabetri kanningar, enn møguligt er at gera í hesum høpi, áðrenn staðfestast kann, um haldgóðar loysnir eru. Serliga skulu nevnast tvey øki, ið eru skattliga áhugaverd:

***Skatting av fastari ogn***: Fastognarskattur er í nógvum londum, og er hetta ein møguleiki at breiðka um skattagrundarlagið. Skattateoretiskir fyrimunir av at hava fastognarskatt eru m.a. at munurin á skattingini av sethúsaeigarum og leigarum hvørva. Mælt verður til at kanna møguleikan fyri fastognarskatti.

***Pensjónsøkið***: Ásetingarnar um pensjónsskatting eru ikki eftirmettar í longri tíð, og sjálvsagt skuldi tí verið at vita, um tær galdandi reglurnar enn eru optimalar.

Stuðul og skattafyrimunir til pensjónsuppsparing eru innbygd í skattaskipanina á ymsar hættir:

- Pensjónsinngjøld eru ikki skattskyldug, og svarar hetta til, at uppspararin fær eina skattasparing svarandi til marginalskattin, meðan spart verður upp. Ístaðin verður uppsparingin skattað, tá hon verður útgoldin. Útgjaldið fellur oftast í tíðarskeiðum, tá ið skattaborgarin hevur eina lægri inntøku og harvið lægri skatt, og tí fær hetta avleiðingar fyri skattainnntøkurnar hjá tí almenna.
- Tá ein kapitaluppsparing verður útgoldin, verður útgjaldið skattað við 35%, og er tað sera lagaligt í mun til núverandi skattaskipan. Árliga inngjaldið til kapitalpensión er avmarkað til kr. 46.200, og øll uppsparingin kann gjaldast út í einum, eftir at uppspararin hevur fylt 60 ár.
- Leypandi avkast av pensjónsuppsparingum (t.e. rentur, vinningsbýti og kursvinningar), verða ikki skattaðir. Hetta er sera lagaligt í mun til kapitalvinning, ið vanliga verður skattaður við 35%.

Við hækkandi pensjónsuppsparingum fer økt skatting av pensjónsinntøkum at vera við til at fíggja eina ikki heilt lítla lækking av inntøkuskattinum. Í hesum sambandi er natúrligast at skatta leypandi avkastið á einhvønn hátt. Í sambandi við eina umlegging av pensjónsskattaskipanini kundi eisini verið hugsað um støddina á frádráttinum í inntøkuskattinum og um skattin á útgjaldinum.

Stórar pensiónsuppsparingar hjá føroyingum eru spardar upp í donskum pensjónsgrunnum, og verður henda uppsparing skattað í Danmark. Rættast hevði verið at føroysk uppsparing verður skattað í Føroyum, og skattliga støðan hjá føroyskari pensjónsuppsparing í útlondinum eigur tí at verða kannað, við tí endamáli at fáa allan ella part av skattingarrættinum av hesum peningi til Føroyar.

## 4. Stuðul skal vera sjónligur á fíggjarlógini

Sum nevnt fleiri ferðir verður mett, at vinnuligur studningspolitikkur í flestu førum er skaðiligur fyri samfelagsbúskapin. Tí verður mælt til eina skattaumlegging, har studningsskipanir verða tiknar av og inntøkuskatturin verur lækkaðar.

Ein trupulleiki er eisini, at kostnaðurin av vinnuligum studningi er lítið sjónligur í almennum roknskapum, av tí at hann ofta hevur verið lagdur inn í skatta- og avgjaldsfrádráttarskipanir heldur enn at verða útgoldin sum stuðul úr landskassanum.

Hetta ger stóran mun í roknskaparliga gjøgnumskygninum hjá tí almenna, tí har stuðul verður bókaður sum útreiðsla, verða manglandi inntøkur (sum t.d. frádráttir) ikki bókaðar. Hetta, hóast stuðul og frádráttir í royndum hava somu realbúskaparligu avleiðingar, og tað tí hevur eins stóran týdning hjá politikarum og borgarum at kenna avleiðingarnar av frádráttarskipanum sum av stuðulsskipanunum.

Fyri at loysa trupulleikan við gjøgnumskygninum, verður tí fyri allar vinnuligar og sosialar frádráttarskipanir mælt til ein av tveimum leistum:

- At leggja frádráttin um til stuðul, ella
- At budgetterað verður við frádráttum á fíggjarlógini eins og við stuðli, so at eitt eins greitt og alment atkomandi yvirlit fæst yvir frádráttarskipanir sum stuðulsskipanir.

Sum dømi um umlegging kunnu nevnast barnafrádrátturin og frádrátturin til kapitalpensjónir, ið áttu at sæst á fíggjarlógini.

## 5. Dupultskatting

Hjá fyritøkum og privatpersónum, ið arbeiða í fleiri londum, er mangan torført at fáa greiðu á, hvussu tey skattliga eru stillað. Hetta er sjálvandi ikki heppið í einum heimi, har lættari og lættari verður at flyta um landamørk. Samstundis sum altjóðagerðin gerst ein størri partur av samfelagsmenningini, skulu tí gerast fleiri munagóðar avtalur við onnur lond fyri at minka um teir trupulleikar, ið koma av dupultskatting, eins og skattligu reglurnar í Føroyum skulu gerast smidligari, fyri at lætta um møguleikarnar hjá arbeiðsmegini at flyta um landamørk.

## Kapitalmarknaður

**Ein liberalur kapitalmarknaður, har tað almenna avmarkar seg til at vera eftirlitsmyndugleiki, ið tryggjar, at marknaðurin altíð virkar væl.**

## Soleiðis røkka vit málinum

Føroyski kapitalmarknaðurin tørvar ikki tær heilt stóru broytingarnar. Kapitalur hevur rímuliga frítt at ferðast til og frá útheiminum, fíggjarøkið er væl regulerað, og av tí at somu krøv verða sett føroyskum peningastovnum sum donskum, er álit á føroyska peningaheiminum.

Ein føroyskur virðisbrævamarknaður er settur á stovn. Virðisbrævamarknaðurin skal hava loyvi at menna seg eftir vanligum marknaðartreytum, og mælt verður frá, at tað almenna við stuðli ávirkar marknaðin – t.d. við at geva skattalættar tá borgarar keypa partabrøv.

Menningarmøguleikar á føroyska kapitalmarknaðinum, eru t.d. at fremja liberaliseringar á tryggingar- og eftirlønarøkinum. Hesi øki hava lógarásetingar, ið forða fyri at fólk frítt kunnu keypa sær hesar tænastur uttanlands. Ein onnur forðing fyri veruligari kapping á eftirlønarmarknaðinum er at bonusuppsparing ikki fylgir við, tá ið kundar skifta millum eftirlønarfeløg. Út frá einum marknaðaratliti er tí lítið, ið talar fyri, at verandi skipan er tann besta.

Mælt verður tí til at gera eina kanning av tryggingar- og eftirlønarøkinum við tí í hyggju at:

- Lætta um møguleikarnar hjá fólki at skifta eftirlønarfelag, har parturin hjá eftirlønartakaranum av kollektivu bonusupphæddini (Útjavningargrunninum) skal fylgja við, tá ið skift verður til annað felag, og at til skal bera at flyta felag uttan at gjalda stór gjøld fyri tað.
- Lætta um møguleikarnar hjá fólki at hava sína eftirløn uttanlands. Í hesum sambandi er týdningarmikið, at tey skattligu viðurskiftini eru greið, og at skattainntøkurnar av pensjónsuppsparing eru í Føroyum.

## Almennur bygnaður

**Lóggávan og almenna umsitingin verða miðvíst skipað soleiðis, at tey hóska til eitt lítið land sum tað føroyska. Almenni geirin skal á besta hátt veita borgarum og fyritøkum góða og skjóta tænastu.**

# Soleiðis røkka vit málinum

### 1. Nýggj almenn játtanarskipan verður innførd, har Landsstýrið í samráðingum innan 1. mai setur teir makrobúskaparligu karmarnar fyri komandi árið.

Nýggj játtanarskipan verður sett í verk, har Landsstýrið í samráðingum innan 1. mai setur teir makrobúskaparligu karmarnar. Í hesum sambandi skulu inntøkur og útreiðslur hjá kommununum og hjá almennum grunnum eisini ásetast, so at yvirskipað stýring er á almenna búskapinum. Almenni fíggjarkarmurin skal góðkennast í Løgtinginum.

Frá 1. mai til 1. oktober verða raðfestingarnar á ymsu rakstrarøkjunum ásettar innan avtalaða karmin. Henda mannagongd viðførir betri møguleikar hjá almennu leiðslunum at leggja komandi fíggjarárið til rættis, umframt at hækka almenna tænastustigið.

Tá mannagongdin er broytt, til at samráðst verður um ein samlaðan, almennan fíggjarkarm, verður møguleiki fyri, at førdur kann verða ein samskipaður búskaparpolitikkur fyri Føroyar. Dentur fer tí ikki einans at verða lagdur á úrslitið hjá landskassanum, men heldur á samlaða, almenna búskapin. Hetta hevur týdning, bæði tá ið ræður um konjunkturbúskaparpolitikk, og tá raðfestast skal, hvussu nógv tað almenna sum heild skal nýta til ymsu økini.

### 2. Miðfyrisitingin verður savnað á einum stað, og talið á umsitingarligum eindum verður minkað munandi.

Samskipan og samskifti eru týdningarmikil amboð, tá ið umsitingin skal fremja ætlanir sínar á besta og bíligsta hátt. Við at savna miðfyrisitingina á einum stað fáa vit eitt breiðari og betri fakligt umhvørvi, samskiftismøguleikarnir verða betri, og harvið eisini vitanargrundarlagið, tá ið avgerðir skulu takast. Hølisviðurskifti eru ikki til at savna miðfyrisitingina í dag. Tí er neyðugt at byggja, um málið um at savna miðfyrisitingina skal røkkast. Ein møguleiki er at byggja ein heilt nýggjan bygning, ið kann húsa miðfyrisitingini undir sama taki, og sum er bygdur til endamálið. Hóast ein slíkur bygningur er ein stór íløga, fæst partur av kostnaðinum inn aftur, m.a. við sølu av øðrum bygningum, og við at spart verður í húsaleigu.

Hugsjónin aftan fyri málið um at minka talið á umsitingarligum eindum tekur støði í tí sannroynd, at tá Føroyar er eitt lítið land, vil eindarkostnaðurin av almennum stovnum nærum altíð vera størri í Føroyum enn í øðrum londum, og tí er ein meiri tilvitað tillaging til hesa sannroynd ein fyritreyt, um Føroyar skulu vera millum fremstu lond í heiminum. Meiri skal tí verða hugsað um at skapa størri og sterkari eindir, ið kunnu megna skiftandi

avbjóðingar í nútímans samfelagnum. Eitt miðvíst arbeiði eigur tí at verða gjørt fyri at leggja saman ella at samansjóða almennar stovnar. Mett verður at eitt rímiligt minstamark á stovnseindum er um 15-20 starvsfólk.

**3. Lóggávan skal endurskoðast fyri at tillagað umsitingarligu orkuni. Altjóða lóggáva eigur at verða sett í gildi á økjum, har hetta er neyðugt.**

Skal almenna fyrisitingin nýta sína orku best møguligt, er týdningarmikið at hava í huga, at lógarverkið leggur støðið undir arbeiðið hjá almennum stovnum. Eitt einfalt lógarverk gevur ofta eins góða rættarstøðu sum eitt torskilt lógarverk, m.a. av tí at borgarin hevur lættari við at skilja, hvørji rættindi og hvørjar skyldur, lóggávan gevur. Harafturat hevur ein einføld lóggáva tann stóra fyrimun, at minni arbeiðsorka krevst til at umsita lóggávuna, bæði hjá tí almenna, hjá borgarum og hjá fyritøkum.

Á nógvum lógarøkjum eru møguleikar at gera lógarverkið greiðari og einfaldari. T.d. hava Almannalóggávan og skúlalóggávan stóran tørv á at verða endurskoðaðar, og persóndátalóggávan er eitt annað dømi um eina umsitingartunga lóggávu.

Tó at vit sum aðalmál eiga at hava einfalda lóggávu, hava vit tó á ávísum økjum bundið okkum til at fylgja altjóða reglum. Á sovorðnum økjum kann sjálvsagt verða neyðugt at víkja frá regluni um einfalda lóggávu.

Altjóða lóggáva eigur tó bert at verða sett í verk, har hetta er neyðugt fyri at røkka ávísum endamáli. Endamálið skal vera greitt og ein meting gerast, um neyðugt er at seta fulla lóggávu í verk, ella um endamálið kann verða rokkið við minni víðfevndum ásetingum.

Mælt verður til at gjøgnumganga alla lóggávu, at endurskoða og raðfesta eftir, hvussu umsitingartung lóggávan er, og at samskipa hana. Alt tað, sum kann vera eins, skal gerast eins, t.d. umsóknarfreistir, dokumentatiónshættir, kærufreistir, mannagongdir, eftirlit, umsjón o.s.fr.

Nýggj lóggáva eigur frá tingárinum 2007 at verða umsitingarliga eftirkannað, eins og hon í dag verður løgfrøðiliga eftirkannað. Endamálið er at stuðla aðalráðunum í at einfalda nýggju lóggávuna sum mest, og at lóggeva innlit í umsitingarligu avleiðingarnar og møguligar alternativar skipanarhættir.

**4. Í 2010 er mál- og avriksstýring sett í verk fyri alla landsfyrisitingina.**

Fyri at effektivisera føroysku fyrisitingina, skal mál- og avriksstýring setast í verk fyri allar almennar stovnar. Hetta fer at gera stýringina av almenna virkseminum munabetri og meiri málrættaða.

Mál- og avriksstýring verður sett í verk við at stovnar á hvørjum ári gera sáttmálar við aðalráð um, hvørji mál skulu røkkast í komandi ári. Í sáttmálanum skulu standa mál fyri, hvat stovnurin ætlar at avrika á sínum umsitingarøki. Hetta vil m.a. gera tað greitt, hvat fæst burtur úr játtanini, sum stovnurin fær. Á hvørjum ári verður farna árið eftirmett, og hugt verður at, um tey settu málini vórðu gjøgnumførd. Á henda hátt verður størri dentur lagdur á úrslitini hjá stovnum.

Fyrimunirnir við mál- og avriksstýring eru fleiri:

*Skaptar verða fyritreytir fyri, at alment virksemi verður rikið munadygt*: Játtanarskipanin í dag (fíggjarlóg o.a.) leggur ikki upp til, at ein skal røkka útgreinaðum úrslitum, hvørja ferð játtan

verður latin, men heldur at stovnurin innan ávísar óformligar rammur ger av, hvussu játtanin skal nýtast. Sáttmálastýring vil í stuttum gera, at ein fer frá játtanarstýring yvir til avriksstýring. Hetta vil gera, at úrslitið og ikki játtanin kemur miðdepilin.

*Bøta um samskiftið við brúkaran*: Ein týðandi partur av arbeiðinum hjá nógvum stovnum er at samskifta við brúkarar av almennum tænastum. Við avrikssáttmálum verður tað natúrligt, at nøgdsemi hjá viðskiftafólkunum verður eitt týðandi mát, tá ið avrikið verður eftirmett.

*Økja innlitið í virksemið hjá stovninum*: Við avrikssáttmálum skulu stovnar greiða frá, hvørjum málum teir arbeiða við at loysa. Skal bera til at eftirmeta avrikini hjá stovninum, skal krav vera um, at stovnar vísa opinleika um virksemi sítt. Hetta fer at økja um innlitið í stovnin og fer at geva borgarum betri møguleika at meta um, hvørt stovnurin røkkur sínum máli.

*Bøta um samskiftið millum stjórnarráð og stovn*: Mál- og avriksstýring verður gjørdur sum sáttmáli millum stovn og avvarðandi aðalráð. Hetta ger, at samskiftið millum stjórnarráð og stovn fer at taka útgangsstøði í sáttmálanum og teimum úrslitum, sum stovnurin skal røkka, eins og stjórnarráðsins eftirlit við stovninum verður grundað á, at málini í sáttmálanum skulu røkkast.

Fyrstu mál- og avrikssáttmálarnir verða gjørdir í 2007, og í 2010 hava allir landsstovnar mál- og avrikssáttmálar.

## 5. Árini 2007-2010 verður ein skipað, strategisk førleikamenning sett í verk fyri alla landsfyrisitingina.

Tað almenna tekur sær av einum stórum parti av kjarnuuppgávunum í føroyska vælferðarsamfelagnum. Skal tað almenna megna tær avbjóðingar, ið eru fyri framman, er umráðandi at hava góð og dugnalig starvsfólk. Ein fortreyt fyri hesum er, at almennu stovnarnir eru góð og mennandi arbeiðspláss, har fólk vil arbeiða, og har starvsfólkið trívist.

Førleikamenningin tekur støði í teimum málum og uppgávum, sum einstaki stovnurin hevur. Við støði í hesum ger leiðslan sær eina mynd av, hvørjar førleikar starvsfólkini eiga at hava í dag og í framtíðini. Saman við einstøku starvsfólkunum eiga stovnarnir at seta ítøkilig mál og ætlanir fyri, hvussu tey kunnu mennast.

Menningarætlanirnar fyri starvsfólkið eiga at verða gjørdar í samsvari við tær avtalur um skipaða og strategiska førleikamenning, ið flestu fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum hava gjørt við Fíggjarmálaráðið.

Í 2007 verður ein eftirmeting gjørd av, hvussu arbeitt verður við førleikamenning í almennu umsitingini í dag. Í 2008 verður sett í verk ein ráðgevingarskipan, har stovnsleiðarar kunnu leita sær ráð og leiðbeining um, hvussu teir á besta hátt kunnu arbeiða við miðvísari førleikamenning.

## Býtið millum alment og privat

**Allar samfelagsligar uppgávur skulu loysast soleiðis at størst møgulig virði verða skapa. Tað almenna skal røkja tær uppgávur, ið eru neyðugar fyri at tryggja vælferðarsamfelagið. Harumframt skal tað almenna hava eftirlit við, at fyritøkur lúka krøv um arbeiðsumstøður, dálkingarvanda, kappingarreglur og tílíkt. Tað privata tekur sær av teimum økjum, ið best kunnu røkjast eftir marknaðartreytum.**

Vinnuligt virksemi verður best rikið eftir marknaðartreytum. Tað almenna skal ikki leggja seg út í raksturin av marknaðarligum virksemi. Uppgávan hjá tí almenna er at seta karmarnar fyri vinnulívinum og røkja tær eftirlitsuppgávur, ið eru ásettar. At tað almenna beinleiðis leggur seg út í privat marknaðarvirksemi verður mett at vera skaðiligt. Hóast nógv er broytt á hesum øki síðan sjey- og áttatiárini, er enn ávíst alment virksemi á privata marknaðinum, og rættast var, at tað almenna fór burtur úr hesum virksemi.

## Soleiðis røkka vit málinum

### 1. Verandi einskiljingartilgongd skal vera framd innan 3 ár.

Landið eigur í dag fleiri fyritøkur, ið virka í kapping á privata marknaðinum. Mælt verður til, at hesar fyritøkur verða seldar privatum at reka. Gongd er longu í tilgongdini at einskilja fleiri av almennu fyritøkunum, og týdningarmikið er at halda fast við hesa tilgongd. Mælt verður tí til, at partabrøv landsins í m.a. Føroya Banka, Atlantsflogi, Føroya Lívstrygging og Føroya Tele verða seld fyri ársenda 2009, tó sjálvandi við fyriliti fyri, at landið fær sum mest burturúr.

Mælt verður harafturat til, at inntøkurnar av einskiljingunum verða nýttar til at gjalda niður almenna skuld, m.a. við tí í hyggju at lata lægri rentuútreiðslur fíggja skattalækkingina, sum mælt verður til í kapitlinum "Skatta- og avgjaldsskipanir."

### 2. Almennnar fyritøkur og stovnar, hvørs virksemi verður betur rikið eftir vanligum marknaðartreytum verða einskildar.

Mælt verður til at einskilja m.a. Jarðargrunnin og Húsalánsgrunnin, so at tað almenna við virksemi sínum í hesum grunnum ikki ávirkar býtið av arbeiðsmegi og kapitali millum vinnuøkir. Kanna eigur at verða hvørjir aðrir stovnar høvdu verið betri riknir eftir vanligum marknaðartreytum, fyri síðan at einskilja teir. Frátikið skal tó verða tað virksemi, sum gjørt verður av sosialum orsøkum. Inntøkurnar, sum stava frá einskiljingini av hesum grunnum og stovnum skulu verða nýttar til at gjalda niður almenna skuld og harvið fíggja ein lægri inntøkuskatt.

### 3. Uppgávur og tænastur, ið tað almenna røkir, men sum kundu verið betur riknar undir marknaðartreytum verða útveittar

Møguleikin fyri at útveita ein part av almenna virkseminum á økjum, har kapping kann tryggjast millum veitarar, ella á økjum, sum krevja servitan, sum ikki er tøk hjá tí almenna skal kannast. Dømi um øki, ið aðrastaðni eru útveitt eru t.d. reingerð og rakstur og umsiting av tólbúnaði og ritbúnaði.

### 4. Ein kanning skal gerast av vinnurekandi sjálvsognargrunnum fyri at varpa ljós á teirra ávirkan á føroyskt vinnulív.

Vinnurekandi grunnar og grunnalíknandi feløg hava almikla ávirkan á føroyskt vinnulív og standa fyri einum stórum parti av tí kapitali, sum er bundin í vinnulívinum. Máta eftir eginpeningi eiga hesir[1] á leið 2,9 milliardir kr., sum í stóran mun eru settar í føroysk virði. Støddin á grunnunum ger, at teir eru av týdningarmestu aktørunum í føroyska vinnulívinum.

Tað serliga við slíkum grunnum er, at aftur ímóti vanligum vinnufeløgum er eingin eksternur eigari, sum hevur eftirlit við leiðslu og nevnd og harvið tryggjar, at kapitalurin verður umsitin soleiðis at hann gevur stórst møguligt avkast. Viljin til at taka váðar í slíkum grunnum kann vera øðrvísi enn hjá øðrum sløgum av feløgum, og kann hetta vera ein trupulleiki hjá grunnunum í mun til fyritøkur við eksternum eigarum.

Tann serligi ognarbygnaðurin og tann ávirkan, sum hesir grunnar hava á føroyska samfelagið gera, at leikluturin hjá hesum grunnum í samfelagnum eigur at verða kannaður, og harumframt eigur at verða kannað, um betri var, at eksternir eigarar stýrdu teimum feløgum, sum grunnarnir eiga.

1 T.e. serliga Ognarfelag Tryggingartakaranna, Sparikassagrunnurin, Norðoya Sparikassi, Framtaksgrunnurin, Føroyagrunnurin og Suðuroyargrunnurin. Fíggingargrunnurin frá 1992 er ikki við í hesi uppgerð, av tí at hann væntandi verður niðurkapitaliseraður.

**Býtið millum land og kommunur**

**Kommunurnar verða færri og størri, so at tær sjálvstøðugt kunnu røkja tær uppgávur, teimum er álagdar.**

**Uppgávur verða loystar, har tær verða røktar á besta hátt samfelagsliga. Ein skipan, har kommunurnar innan fyri ásettar karmar hava frælsi og ábyrgd at skipa egin viðurskiftir.**

## Soleiðis røkka vit málinum

1. **Kommunali bygnaðurin skal endurskipast:**
   - **Talið á kommunum skal minkast niður í 7. Kommunustýrini hjá hesum kommunum taka við 1. januar 2009.**
   - **Gjørd verður ein tíðarbundin raðfesting av, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur verður greitt.**
   - **Gjørd verður ein millumkommunal útjavningarskipan.**

Í dag eru 34 kommunur í landinum, av teimum hava 5 færri enn 100 íbúgvar, 5 hava millum 100 og 200, 10 hava millum 1.000 og 2.000 íbúgvar, og bert 3 hava fleiri enn 2.000 íbúgvar. 1. januar 2009 skulu vera 7 kommunur. Tær kommunur, ið ikki hava gjørt avtalu um at leggja saman, tá ið eitt ár er eftir av verandi kommunuvalskeiði, verða lagdar saman við lóg, so at á kommunuvalinum 11. november 2008 verða vald 7 nýggj kommunustýri at taka við 1. januar 2009.

Á nógvum økjum er ógreitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur. Nevnast kunnu t.d. eldraøkið, forsorgarøkið, tey heimleysu, primera heilsutænastan, hvíldarheimið "Naina", fólkaskúlaøkið, kvøldskúlaøkið, musikkskúlaøkið, bókasavnsøkið, matvøruøkið og havnaøkið.

Ein ítøkilig raðfestingaravtala verður gjørd við kommunufeløgini, ið ásetur, hvørji økir verða løgd til kommunurnar og í hvørjari raðfylgju. Henda raðfestingaravtala skal verða gjørd í góðari tíð áðrenn kommunuvalið 2008 og skal tryggja, at vit í seinasta lagi í 2015 hava eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

At skerja talið á kommunum er ikki eitt mál í sjálvum sær, men við 7 kommunum verða kommunueindirnar munandi størri, enn um tær eru 34, sum nú. Á henda hátt fáa kommunurnar bæði størri og fjølbroyttari inntøkugrundarlag og eisini størri fíggjarliga orku.

Við størri kommunueindum og betri fíggjarligari orku verða kommunurnar betur førar fyri at røkja tær uppgávur tær fáa at røkja. Kommunan fær betur nøkta staðbundna tørv og ynskir borgarans, og við hesum fæst eitt betri og fjølbroyttari kommunalt tænastustøði. Við størri kommunalum eindum er lættari hjá kommununi at fáa sær tann neyðuga førleikan at skipa seg soleiðis, at tilfeingið verður gagnnýtt sum best.

At kommunurnar verða størri, fáa betri fíggjarliga orku og fleiri uppgávuøki at røkja, skuldi eisini borið við sær, at tær helst kunnu økja um umsitingarligu styrkina og um fakliga førleikan. Við at savna fólkini, sum nú eru í kommununum, og sum hava holla vitan um kommunuviðurskifti, kann kommunan skapa eina betri og sterkari umsiting.

Um fakligi førleiki kommununnar økist í sterkari kommunueindum, so hevur tað í kjalarvørrinum eina gagnliga ávirkan við sær á mongum øðrum økjum. Hetta økir um møguleikarnar at menna og útbyggja kommununa, og tað dregur so aftur at sær fólk, ið bæði hava hug at stovnseta virki og at búseta seg í kommununi. Av hesum mennist kommunan enn meiri, og jú sterkari hon er, tess fleiri uppgávur kann hon røkja.

Við at leggja økir til kommunurnar at umsita, verða umsitingar- og eftirlitsmyndugleikin hjá landinum í fleiri førum atskildir, og tí verður meiri orka hjá landsumsitingini at gera yvirskipaðar lógarkarmar, útfylla teir og at hava veruligt eftirlit við, at kommunur umsita uppgávur sínar innan fyri ásettar karmar.

Við støði í teirri meginreglu, at kommunurnar skulu vera javnsettar at røkja sínar uppgávur, er neyðugt at leggja upp fyri ójavnanum í fíggjarviðurskiftunum við eini javningarskipan. Við eini javningarskipan verður miðað eftir, at allar kommunur eru fíggjarliga førar fyri at loysa tær kommunalu uppgávurnar, sjálvt um umstøðurnar hjá teimum ikki eru tær somu. Á henda hátt slepst undan, at ov stórur munur verður í kommunuskattaprosentinum, tó so at ein ávísur munur altíð fer at vera, alt eftir, hvussu kommunurnar leggja tænastustigið. Innihaldið í kommunalu skipanini er júst grundfest í, at kommunurnar hava møguleika at laga kostnaðarstigið og tænastuna eftir staðbundnu ynskjum borgaranna. Endamálið er tí ikki at tryggja, at kommunurnar eru eins, men at tær hava samlíkar umstøður at røkja lógarásettu uppgávurnar. Munur í inntøkugrundarlagi og útreiðslutørvi ger, at ymiskt er, sum kommunurnar eru fyri:

- Kommunurnar hava ikki sama inntøkugrundarlag. Í summum kommunum búgva nógv fólk við stórum inntøkum, í øðrum kommunum er øvugt.
- Kommunurnar hava eisini ymiskan útreiðslutørv, tí bæði tann sosiali bygnaðurin og aldurssamansetingin í kommununum eru so ymisk kommunanna millum. Ein kommuna hevur t.d. nógv børn og tí stórar útreiðslur til dagansingarpláss og skúla; og onnur hava fá børn og ikki so stórar útreiðslur á hesum øki.

Ein útjavnan fevnir tí um javnan av muni í inntøkugrundarlagnum og útreiðslutørvinum fyri hvønn íbúgva hjá kommununum. Talan er ikki um at javna allan ójavna, men ein part. At áseta eitt javningarprosent er ein politiskur spurningur, og hyggja vit t.d. at hinum Norðurlondunum, javna tey ikki eins. Umráðandi er tó, at hetta verður gjørt samstundis, sum kommunurnar verða skipaðar í færri eindir, og ikki við verandi kommunuskipan.

2. **Uppgávur skulu loysast so nær borgaranum sum gjørligt:**
    - **Allar lógarásettar, kommunalar uppgávur skulu røkjast innan fyri kommunumark**
    - **Uppgávur, sum kommunurnar ikki kunnu loysa fullgott sjálvstøðugt, skal landið varða av.**
    - **Avgerð og fíggjarlig ábyrgd skulu fylgjast**

Støðan í dag er, at á øllum økjum, har uppgávubýtið er ógreitt, fylgjast avgerð og fíggjarlig ábyrgd ikki. Dømi er eisini um, at øki er lagt til kommunurnar, har smærri kommunur hava fingið álagt lógarbundið samstarv fyri at røkja uppgávuna.

Málið um, at avgerð og fíggjarlig ábyrgd skulu fylgjast merkir, at tað altíð skal havast í huga, at er ein uppgáva kommunal, so skulu kommunurnar fíggjað uppgávuna; men er tað landsuppgáva, so skal landið fíggjað. Hetta hevur við sær, at bara tey, ið taka avgerðir, kunnu taka á seg fíggjarligu ábyrgdina av avgerðunum. Tryggjast skal, at tey, ið hava ábyrgdina, ikki kunnu sleppa sær undan henni, við einki at gera ella at leggja útreiðslur á onnur við at lata standa til. At uppgávur og ábyrgd fylgjast ger, at borgarin betur kann skyna á, hvat tað kommunala virksemið í roynd og veru kostar. Við hesum kann borgarin seta strangari krøv til nýtsluna av skattakrónum sínum.

Ein onnur avleiðing av ógreiðum heimildar- og ábyrgdarbýti er, at trupult kann vera at heildarstýra við bestu tilfeingisnýtslu fyri eygað. Sum dømi kunnu nevnast skúlaøkið og eldraøkið. Á skúlaøkinum taka kommunurnar avgerð um karmar og undirvísingartilfar, og landið tekur avgerð um undirvísingina. Í gerandisdegnum hanga hesi viðurskifti tó neyvt saman, og tí er umráðandi at síggja tey í eini heild fyri at fáa bestu nyttu burtur úr teimum íløgum, ið verða gjørdar á økinum. Á eldraøkinum vísa royndir aðrastaðni okkum, at stórur vinningur er í at hava eldraøkið í eini heild, t.e. at leggja innihald og bygging til rættis undir einum. Í dag verður mangan bygt á eldraøkinum út frá møguleikanum at fáa stuðul heldur enn út frá rakstrardyggum samanhangi. Og hóast hugsanir um samanhang hava verið, er framhaldandi raksturin eisini bundin av raðfestingum hjá øðrum myndugleika enn tí, sum byggir.

At lógarásettar, kommunalar uppgávur skulu røkjast innan fyri kommunumark, merkir, at tað bara skulu vera uppgávur, sum kommunurnar kunnu loysa sjálvstøðugt, ið verða lagdar til teirra. Kunnu tær ikki tað, skal landið røkja tær. Samstundis merkir hetta, at kommunurnar skulu kunna tillaga uppgávurnar eftir egnum tykki innan fyri ásettar karmar.

Hugtakið ”kommunusamstarv” kann verða býtt sundur í helvt: felagskommunalt samstarv við fyriskipanarligum bygnaði, og felagskommunalt samstarv uttan fyriskipanarligan bygnað.

Viðvíkjandi felagskommunalum samstarvi við fyriskipanarligum bygnaði verður sett á stovn sjálvstøðug fyriskipan, sum samstarvandi kommunurnar síðan leggja myndugleika sín til. Slíkt samstarv er á ein hátt í andsøgn við tað staðbundna sjálvstýrið, við tað at møguleikin hjá kommununum at raðfesta uppgávurnar minkar munandi, av tí at bæði tilfeingi og myndugleiki verða latin hesi sjálvstøðugu fyriskipan at røkja. Tílíkt samstarv er heldur ikki í samljóði við fólkastýrið, við tað at leiðslan í felagskommunala samstarvinum verður vald óbeinleiðis av kommunustýrunum. Tessvegna fær borgarin bert óbeinleiðis ávirkan á tær avgerðir, ið tiknar verða, og samstarvsleiðslan stendur bert óbeinleiðis til svars mótvegis borgarunum. Meginreglan um, at uppgávu- og ábyrgdarbyrðan skulu fylgjast, verður eisini brotin. Uppgávan verður latin samstarvinum, tó at kommunurnar hava endaligu fíggjar-ábyrgdina.

Felagskommunalt samstarv eigur tí bert at vera eitt ískoyti til ein endurskipaðan, kommunalan bygnað. Harafturímóti er einki til hindurs fyri felagskommunalum samstarvi uttan fyriskipanarligan bygnað. Kommunusamstarv av hesum slagi kann snúgva seg um keyp og sølu av tænastum og samskipan, har veruligar avtalureglur galda.

### 3. Kommunali búskapurin skal vera gjøgnumskygdari og sambæriligari, bæði millum kommunurnar sínámillum og millum kommunurnar og landið

Virðið á teimum upplýsingum, ið fáast kunnu úr roknskaparkeldum, er ongantíð meiri enn lutvíst knýtt at einstaka roknskapinum, tí tað veldst eisini nógv um møguleikarnar at bera saman við aðrar líknandi roknskapir.

Á tí kommunalroknskaparliga økinum er støðan í dag tann, at ov fáar og ov breiðar ásetingar eru um økið. Hvør einstøk kommuna hevur breiðar møguleikar at gera ásetingar, ið bróta frá ásetingunum hjá øðrum kommunum, og tí er torførari enn neyðugt at samanbera útreiðslustigið hjá ymsu kommunum. Tí er ringt at fáa eina heildarfatan av tí kommunala geiranum. Fyri at bøta um búskaparstýringina á kommunala økinum, verður mælt til at gera neyvar og strangar felagsreglur fyri kommunala roknskaparøkið, so at lættari verður at samanbera ymsar eindarkostnaðir hjá einstøku kommununum. Harvið kann ein eisini ala fram ein meiri tilvitaðan hugburð um at gagnnýta kommunala tilfeingið sum best.

Av tí at kommunali geirin í støðd er áleið ein triðing av landinum og tí hevur rættuliga stóran týdning fyri stýringina av almenna búskapinum, skal harumframt vera lætt at samanbera við landsbúskapin. Allir kommunalir roknskapir skulu tí hava greiðar felagsásetingar um roknskaparuppstilling sum gera, at kommunalir roknskapir fáa felags kontostreingir og felags ásetingar um bókføring, ið kunnu sammetast við tær hjá landinum.

Gerast skal ein fíggjarskipan, sum kommunur antin skulu nýta ella regluliga fráboða til. Ein sovorðin skipan skal tryggja, at almenn fíggjarhagtøl skjótt kunnu fáast til vegar, at kommunali geirin er gjøgnumskygdur, og at eitt greitt samanberingargrundarlag fæst millum kommunurnar sínámillum og millum kommunurnar og landið. Henda raðfesting av kommunalu fíggjarskipanini er m.a. grundað á, at gjøgnumskygni og sambæri í kommunala geiranum eru fortreytir fyri, at fleiri økir kunnu leggjast út til kommunurnar, samstundis sum hetta eisini verður grundarlag undir eini javningarskipan millum kommunur.